# Politisk óvissa ørkymlað meira enn búskaparlig

**Ein av innbodnu gestunum til sjósetingina av nýggju Norrønu í Lübeck leygardagin var Atli Dam. løgmaður, sum hevur verið ein av teim politikkarum í Føroyum, ið hevur stríðst mest fyri at varðveita og menna uttanlandssiglingina. Tí var hann eisini ein av høvuðsrøðarunum aftaná sjósetingina.
Atli Dam segði:**



*Atli Dam var ein av heiðursgestunum, tá nýggja Norrøna fór av bakkastokki.*

Eri sera fegin um høvið til at vera hjástaddur við eina hending, har vit einaferð enn hava troka eina pisu av rókini og á sjógv, hóast onga vissu um, at hon er fullfloygd og før fyri at flúgva yvir høv, tá hon aftur ynskir tað.

Óvissa um hin mannaskapta karmin – serliga hin politiska – hevur altíð verið lagnan hjá hesum skipi. Hvørt hann er hóskandi til eitt frískt og blómandi lív við vøkstri og margfaldan av eini framtíðar familju ella ikki.

Hendan óvissa hevur ørkymlað meira enn tær veruligu búskaparligu fortreytirnar í flutningsvinnu og teim veruligu møguleikunum fyri lønandi íløgum.

Lomvigan ger sær ikki reiður, hon nýtir alla sína umsorgan til at ansa eftir einum einasta eggi, vorpið beinleiðis á klettin. Ræna vit tað ella ferst tað á annan hátt, kann hon verpa eitt afturat. Gevur heldur ikki tað lív og hetta er hent áður, kann hetta enda við, at ein heil grein í ættini doyr. Genetiski strongurin verður avkvettur. Onkuntíð tekur onkur longri úti í ættini yvir á rókini, onkuntíð kann eitt heilt annað slag kanna sær alla rókina.

Sum lomvigan, hevur Smyril til dagin í dag bert klakt eina pisu, og nú hevur Norrøna skjótt ligið tíðina á sínum fyrsta eggi. Men pisan í tí fær ein heilt annan og øktan foreldraskara.

Eg veit ikki um íslendska, føroyska og hetlendska lomvigan nakrantíð parast ella fríggja. Gera tey ikki tað, kunnu vit kanska tala um foreldur av blandaðum etniskum uppruna, sum hava ættleitt eina lomvigapisu, sum upprunaliga var føroysk.

Nú segði eg lomvigapisa, men Smyrilin er jú ein heilt annar fuglur, so her er týðuliga eitt hamskifti farið fram. Men »never mind« á okkara døgum tosa vit so nógv um etniska integratión og harmonisering, sum eg sjálvur haldi er púra ok. so lat okkum halda dópsgildi fyri hesi multietnisku pisu.

Í sektsi- og sjeytiárunum hendi eitt veldugt framlop í vegagerð í oyggjum og økjum hvør sær í Føroyum. Seint í sekstiárunum stóð samstundis greitt, at vanliga mynstrið í sjóvegis flutningi av ferðafólki var vónleysa ólønsamt.

Farmaflutningshátturin kundi heldur ikki nøkta tann tørv, sum stórur partur av marknaðinum segði seg hava.

Hesin tørvur – hesi »missing links« ímillum økini – kundu eyðsýniliga verða loystur við Roll on-Roll off tøkni.

Palleba – vanligi virkandi føroyingurin – kom í størri og størri tali á pall sum bilaánari og hann kravdi at fáa bilin við, tá hann fór at ferðast. Hann nýtti nógva orku fyri at fáa bil sín hivaðan inn á eitt skipsdekk, har hann samstundis fekk ókeypis bilavask í sjógvi. Hesi somu krøv setti hann eisini, tá hann ætlaði sær uttanlands. Somu krøv stungu seg eisini upp frá mongum útflytarum, sum vildu hava vøru sína setta á hjól at rulla beinleiðis til móttakaran onkunstaðni inni á europeiska meginlandinum.

Stóra forðingin var, at hallgevandi sambandið innlendis ímillum tey útbygdu økini, altíð varð mett almenn skylda at fáa ílag, meðan hinvegin millumlandssigling bæði bilateralt og multilateralt var friðhalgað øki útlagt til privat fyritakssemi at hóreiggja sær á, uttan mun til um hesin privati sektorur hevði royndirnar, førleikan, fíggjarligu megina og neyðugu servitanina til leiðsluliga at lyfta byrðuna.

Bert ein politisk samskipan ímillum flokkar sum hvør sær vóru mettir at verja ávíkavist privat fyritakssemi ella alment fyritakssemi ella blandaðum privatum og almennum »initiativi« kundi loysa hesa uppgávu.

At enda eydnaðist – í 1975 – tí minst møguliga meirluta av 17 tingmonnum at røkka semju um at keypa eitt skip, sum kundi nokta innlendis tørvin og samstundis fremja nakrar smáar sokallaðar pilotkanningar viðvíkjandi millumlandssigling.

Seinni fingu vit so Teistan og nøkur fá »privat« Ro-Ro farmaskip.

Eg nevndi, at virksemið hjá hesum skipi altíð hevur verið í »trouble water« politiskt, veruliga tungum og vandamiklum sjógvi, sum brúgv ikki kundi leggjast yvir, men sum bar í sær hendingar, sum ikki kundu komið fyri í øðrum landi enn Føroyum, m.a. val í úrtíð.

Stríðið fyri Sct. Sunnivu (Lassa II) sum vit ikki sluppu at keypa, men avloystu við Teistanum og so framvegis, gjørdi enda á sterkastu samgonguni – við 22 tingmonnum – vit nakrantíð hava haft, hon varð niðurslitin av hesum máli og úrslitið bleiv, at vit skuldu leggja tænastuna yvir í »privata« Smyril Line (í 1983).

So seint sum tá, 8 ár aftaná Smyril, stóð kortini greitt, at fuglurin framvegis ikki var fullfloygdur. Tíbetur eydnaðist at lofta pisuni í fallinum, so hon við almennari hjálp kundi setast varligari á sjógvin.

Í dag tosar ein gamal maður, sum tó eins væl og flestu tykkara kundi lata seg hugtaka og eggja av góðum hugskotum til at spenna seg út og nýta orku uppá at gera til veruleika. Í hesum føri ætlanir, sum dugnaligir føroyskir sjómenn, ið høvdu fingið servitan og royndir á brúgv, í maskinrúmi ella á dekki hjá teim fremstu útlendsku reiðaríum, útløgdu fyri mær.

Saman droymdu vit gyltar dreymar, ið bygdu á ta grund og tann tørv, vit hildu okkum síggja ímillum Bergen-Stavanger-Hanstholm-Aberdeen-Lerwick og teir størru býirnar í Norðuratlantshavi, men vit megnaðu ongantíð at útbyggja eina verunliga tænastu í hesum jomfrúuliga økinum, sum tað verunliga var fyri 30 árum síðani.

Onnur feløg hava síðani heystað væl í hesum øki, sum royndist sera fruktagott.

Persónliga setti eg alla orku og »prestisju« í, eins væl og tann flokkur, eg havi umboðað, gjørdi, fyri at gera tað møguligt hjá einum »pooli« – samskipan – av føroyskum feløgum at fremja íløgur í eini trý-fýra skip í nýggjum vinnuvegi.

Úrslitið bleiv Norrøna.

Summi tykkara minnast, at eg fyri 19 árum síðani, á jomfrúferð Norrønu, segði, at tá tað nú skuldi vera, so var eg fegin um at tað bleiv Smyril Line, og at eg vildi veita allan tann stuðul eg møguliga fekk høvi til í framtíðini, um á kom at standa.

Støðan er júst tann sama í dag, um enn ein møguligur stuðul frá mær av nattúrligum orsøkum helst verður mest av moralskum og mentalum slag. Men sjálvandi vil ein altíð verða við til at verja góða umdømið »imagið« hjá Smyril Line.

So hóast vit framvegis bert hava hesa einu og einastu pisu, kunnu brøður og systrar framvegis koma, nú foreldraskarin er øktur so munandi, sum vit hava sæð seinasta árið.

Við ynski um blíðan byr og eydnusama framtíð.


*Frá hátíðarhaldinum*


*So flytur tann næsta Norrøna*



## Mánadagur 2. september

18.30 Likkulikkuleia 27 e
19.00 Miðlingurin Malcolm 19
19.25 Delia Smith — summarmatur
20.00 Dagur og Vika
20.20 Hundar til arbeiðis
20.50 Náttúrumáttur: Vatnflóð — am. dok.
21.45 24 tímar 1:24 — amerikonsk spenningsrøð
22.25 Flett livandi — týsk dokumentarsending. Óhóskandi fyri børn
23.10 Soleiðis eru menn 7:8
23.40 Liðugt

07:30 Superbike: World Championship Germany Oschersleben
08:15 Supersport: World Championship Germany Oschersleben
09:00 Indy Racing League: Illinois Madison United States
10:00 Sidecar: World Championship Germany Oschersleben
10:30 Canoeing: World Championship Spain Seville
11:45 Canoeing: World Championship Spain Seville
13:00 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
15:45 Tennis: New York Stories
16:00 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
23:00 News: Eurosportnews Report
23:15 Football: Eurogoals
00:15 News: Eurosportnews Report

0.00 TLZ: »Nomads of the Wind – The Pierced Sky«
1.00 TLZ: »Conspiracies – Body Panic«
1.30 TLZ: »Castles of Horror – Ring of Steel«
2.00 TLZ: »Secrets of World War II – Confusion was their Business«
3.00 TLZ: »The Road to Riches – Clever and Greedy«
4.00 TLZ: »Ever Wondered?«
4.10 TLZ: »Westernisation«
4.15 TLZ: »Personal Passions- Benjamin Zephaniah«
4.30 TLZ: »Ever Wondered?«
4.55 TLZ: »Tales of the Expected - Riders«
5.00 TLZ: »Italianissimo – La Settimana Bianca«
5.15 TLZ: »Italianissimo – La Riviera Dei Fiori«
5.30 TLZ: »Kids English Zone – Pastimes«
6.00 Bits & Bobs: »Kitten«
6.15 The Story Makers: »Noises«
6.35 Angelmouse
6.40 Clever Creatures
7.05 Blue Peter
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders: »Stanmore«
8.45 Antiques Roadshow: »Kettering«
9.15 Animal People: »Gladys The African Vet«
9.45 Ape-Man: »Adventures in Human Evolution – Exodus«
10.45 Bergerac: »The Deadly Virus«
11.45 The Weakest Link
12.30 Classic Eastenders
13.00 Classic Eastenders
13.30 House Invaders: »Shirley«
14.00 Antiques Roadshow: »St Austell«
14.30 Bits & Bobs: »Kitten«
14.45 The Story Makers: »Noises«
15.05 Angelmouse
15.10 Clever Creatures
15.35 Blue Peter
16.00 Battersea Dogs Home
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Home Front: »Luton«
19.00 Eastenders
19.30 Office Gossip: »Too close for Comfort«
20.00 Judge John Deed: »Rough Justice«
21.30 Parkinson: »Martine McCutcheon, Jennifer Lopez, Wogan«
22.30 Paddington Green
23.00 Paddington Green
23.30 Liquid News

00:00 BBC News
00:30 Correspondent (r)
01:00 BBC News
01:30 Mary Anne's Bikes (r)
02:00 BBC News
02:30 Dateline London (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 Reporters (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Mary Anne's Bikes (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Correspondent (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Is Another World Possible? (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Click Online (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Fast Track
20:45 Holiday
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Earth Report
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:15 Tv-Shop
09:20 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Ricki Lake
12:50 Familien Walton
13:50 Out Of Time
15:35 What About Joan
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Robinson: De Udvalgte
18:30 Robinson: Opgøret Er I Gang - Testen
19:00 Robinson Ekspeditionen - Det Endelige Opgør
20:35 Wild Wild West
22:40 Sexorama
23:10 Tv Razzia
00:15 Walker Texas Ranger
01:15 Simpsons
01:45 Træneren
02:15 Ti Tommelfingre
02:45 Simpsons
03:15 Sunset Beach
04:05 Godnat

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Heri Joensen, prestur, lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Sunnudagsløtan (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Heri Joensen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Løg mær dámar (e) - 3. sending hjá Líggjasi Olsen
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Summarbland (e) - Robert McBirnie leggur til rættis.
15.00 Tíðindi
15.03 Kafé Grugg - Seinnapartssending úr Klaksvík
16.00 Tíðindi
16.03 Kafé Grugg - Seinnpartssending úr Klaksvík
17.00 Tíðindi
17.05 Hvat nú? - Elis Poulsen skipar fyri.
18.00 Tónleikasendingin „Bland" - Arne Thomsen velur løgini
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Garpatáttur - Hans Tórgarð lesur 21. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness. Týtt hava Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs.
19.30 Løg mær dámar - 4. og seinasta sending hjá Líggjasi Olsen
20.00 Summarjazzur - Magnus Johannesen ger sendingina
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi

Rás

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá fríggjadegnum - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 Fólk á rásini (e) - Endursending frá leygardegnum - Vagnur Michelsen leggur til rættis
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
16.00 Tónleikur
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á Leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum - Evni: Stúran, Gud og dagligu tørvir okkara (3:3) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Halleluja - Andalig tónleikasending v/ Heina Lützen og Jógvan Poulsen
22.30 Tónleikur
23.00 Liðugt

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
14.30 "Jesus og eg" Barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
15.00 Bønarlinjan frá hósdegnum verður endursend.
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 Brot & Bitar, ørvísi tíðindasending
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
21.00 Vón fyri tær v/Sólbjørg Zachariassen
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri týsdag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
02:00 Møti (e)
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast

## Týsdagur 3. september

18.15 Tíðindi fyri deyv
18.30 Boyggi 12:13
18.55 Fuglurin Føniks 6:6 28
19.25 Vísindi: Balsamering
20.00 Dagur og Vika
20.20 Undureitrið — søgan um DDT
21.20 Fort Humboldt — amerikanskur kovboyfilmur. Óhóskandi fyri smábørn
22.50 DR-dok.: Tey kemisku børnini
23.50 Liðugt

07:30 Indy Racing League: Illinois Madison United States
08:30 Football: Eurogoals
09:30 Rally Raid: World Cup Rally Masters
10:00 Beach Volley: World Tour Switzerland
11:00 Beach Volley: World Tour Switzerland
12:00 Football: Eurogoals
13:00 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
15:45 Tennis: New York Stories
16:00 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
23:00 News: Eurosportnews Report
23:15 Grand Touring: 2002 Series Japan Gt Championship
23:45 Rally Raid: World Cup Rally Masters
00:15 News: Eurosportnews Report

0.00 TLZ: »Journeys in Time and Space – The Big Bang«
0.30 TLZ: »Journeys in Time and Space – Invisible Universe«
1.00 TLZ: »Supernatural Science – Monumental Mysteries«
2.00 TLZ: »Congo – The River that Swallows all Rivers«
2.50 TLZ: »Make or Break – Proof of the Pudding«
3.20 TLZ: »The Future just Happened – Amateur Vs Professional«
4.00 TLZ: »Jazz Raga And Synthesizers«
4.25 TLZ: »Cyberart«
4.30 TLZ: »The Spanish Chapel Florence«
4.55 TLZ: »Mind Bites«
5.00 Quinze Minutes
5.15 Quinze Minutes
5.30 The Ozmo English Show
6.00 Bits & Bobs: »Castle«
6.15 The Story Makers: »Farm«
6.35 Angelmouse
6.40 Clever Creatures
7.05 Run The Risk
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders: »Shirley«
8.45 Antiques Roadshow: »St Austell«
9.15 Home Front: »Luton«
10.15 Animal People: »Bringing up Baby«
10.45 Ballet Shoes
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders: »Caversham«
14.00 Antiques Roadshow: »Shetland«
14.30 Bits & Bobs: »Castle«
14.45 The Story Makers: »Farm«
15.05 Angelmouse
15.10 Clever Creatures
15.35 Run The Risk
16.00 Big Cat Diary
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Delia's how to Cook: »The Potato«
18.30 Bargain Hunt: »Ardingly«
19.00 Eastenders
19.30 Lee Evans - So what now?: »Moving Out«
20.00 Game on: »Working Girls«
20.30 Dinnerladies: »Catering«
21.00 Maternity: »Foetal Medicine«
22.00 Althorp - A Family Garden«
22.30 Life Support
23.30 Top of the Pops Prime

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Click Online (r)
02:00 BBC News
02:30 Earth Report (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Click Online (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Earth Report (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Fast Track (r)
14:45 Holiday (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Is Another World Possible? (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Talking Movies
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Reporters (r)
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:05 Tv-Shop
08:50 Tv3 Extra
09:20 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Ricki Lake
12:50 Familien Walton
13:45 Cupid And Cate
15:35 What About Joan
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Sabrina - Skolens Heks
18:00 Alle Tiders Barnepige
18:30 Tv3 Extra
19:00 Tv3 Dokumentar
20:00 Face Of A Killer
22:20 Sexorama
22:55 Beach Patrol
23:50 Tv3 Extra
00:20 Ti Tommelfingre
00:50 Walker Texas Ranger
01:50 Simpsons
02:20 Træneren
02:50 Ti Tommelfingre
03:20 Simpsons
03:50 Sunset Beach
04:40 Godnat

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Heri Joensen, prestur, lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Garpatáttur (e) - Hans Tórgarð lesur 21. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness. Týtt hava Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs.
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Heri Joensen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Niðursetileiðarin (e) - Páll Danielsen lesur fyrra part av stuttsøgu, sum Alex Sólstein hevur týtt eftir amerikanska skaldið John Steinbeck.
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Summarjazzur (e) - Magnus Johannesen ger sendingina
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Faktor fimm - Lættur summartónleikur hjá Gunnari Nolsøe
18.00 Barnaútvarpið - Jonna og Katrin stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Føroyar í dag - Sigmar Bláberg stílar fyri
19.30 Sálmar og sangir - Bergur Jacobsen leggur til rættis
20.00 Poppservice - Høgni Zachariasen spælir nýggjan tónleik
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi

Rás

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
16.00 Tónleikur
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
20.00 Barnarásin (e) - Endursending frá sunnudegnum - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
20.30 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Á Torginum (EvR) - Svenning av Lofti leggur til rættis
23.00 Liðugt

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Leygarkvøld í Lindini v/Dánial á Dul Jacobsen (e)
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 Møti (e)
20.00 Tónleikur fyri børn
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
21.00 Tónleikur
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri mikudag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
02:00 Horizon Star (e)
04.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast